## Hjálptu unglingum til lands

Leygardagin vóru fólk frá Trygdarmiðstøðini í Klaksvík á Borðoyavík og hjálptu trimum unglingum í einum lítlum báti til lands. Trygdarmiðstøðin hevur skjótgangandi bát, sum liggur á Borðoyavík.

Teir ungu í bátinum høvdu ilt við at vinna upp land aftur, tí tað knappliga var blivið illveður.

Leiðarin fyri Trygdarmiðstøðina, Marius Magnusson, sigur, at hann varð ringdur upp av einum av foreldrunum, sum bað hann fara at hjálpa.

– Vit vóru skjótir avstað, og eftir einari lítlari løtu vóru vit hjá bátinum. Tað var eingin vandi á ferð, og vit fylgdu bátinum inn, sigur Marius Magnusson.

Skjótgangandi báturin hjá Trygdarmiðstøðin hjálpti eisini einum øðrum báti við einum einsamøllum manni í, sum hevði ilt við at vinna upp land.

**ek**

## Gjaldsstøðin inni í tunlinum

Gjaldsstøðin í Norðoyatunlinum verður 1780 metrar inn í sjálvum tunlinum, hon verður ómannað, og annars verður hon skipað á sama hátt sum í Vágatunlinum.

Norðlýsið skrivar, gjaldsstøðin í Norðoyatunlinum gevur eitt sindur av eyka arbeiði í løtuni, tí tað skal borast fyri henni langt inni í tunlinum.

Gjaldsstøðin verður slakar 1800 metrar inn í fjallinum, og møguleikarnir at gjalda verða teir somu, sum tað er í Vágatunlinum.

Tað vil siga, at fólk kunnu keypa sær ein kubba, og so verða túrarnir í tunlinum goldnir umvegis hann.

Tað ber eisini til at koyra uttan kubba, og tá kann antin gjaldast á eini bensinstøð beint eftir túrin ella gjalda rokningina, sum verður send við postinum. Skrásetingin av bilum uttan kubbar verður gjørd við fototólum, og síðani verður rokning send eigaranum.

Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunnlinum, sigur við Norðlýsið, at tað fer at bera til at brúka sama kubba í báðum undirsjóvartunlunum.

**ek**

# Tobbi boðsendur til fund í tingbólkinum

**Fyri fyrstu ferð síðani november mánað í fjør hevur Torbjørn Jacobsen fingið boð til fund í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum. Floksting í flokkinum hevur samtykt, at eysturoyartinglimurin skuldi tveitast úr tingbólkinum, men góða fólkatingsvalið hevur eftir øllum at døma gjørt enda á stríðnum í flokkinum**

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Stríðið var komið hartil, at tveir persónar vóru settir upp ímóti hvørjum øðrum, og annar skuldi vinna og hin tapa. Tað merkisverda er tó, at valið gjørdi báðar til vinnarar, sigur Torbjørn Jacobsen*

Í dag kann stríðið millum formannin í Tjóðveldisflokkinum og tingmannin Torbjørn Jacobsen verða av. Torbjørn Jacobsen, sum hevur verið úti í kuldanum í flokkinum, síðani hann skrivaði tvær hvassorðaðar viðmerking um arbeiðslagið hjá formanninum í fjørheyst, er fyri fyrstu ferð í fleiri mánaðir boðsendur til fund í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Hetta er tann vanligi fundurin hjá tingbólkinum, sum plagar at vera týsdagar, men eg veit ikki, hvat fer at henda. Hetta er í øllum førum eitt tekin um, at stríðið í flokkinum er um av verða av, sigur Torbjørn Jacobsen.

### Tobbi og Høgni vunnu valið

Tað er líkt til, at veljararnir hjá Tjóðveldisflokkinum týskvøldið í farnu viku gjørdu enda á drúgva stríðnum millum Høgna Hoydal og Torbjørn Jacobsen.

Tjóðveldisflokkurin gjørdist fyri fyrstu ferð størsti flokkur, og bæði Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen høvdu ófóra góð val og gingu fram. Tað vóru teir báðir fram um onnur, sum syrgdu fyri, at Tjóðveldisflokkurin endurvann sær sessin í fólkatinginum.

Hetta fekk formannin í flokkinum at siga, at nú mátti ein loysn finnast í flokkinum, so at hann ikki endaði aftur í sama ruðuleika, sum undan valinum.

Tað, sum áðrenn valið varð kallað eitt timeout, kann nú gerast til eina varðandi friðaravtalu millum teir stríðandi partarnar í flokkinum.

### Veljarin segði sína hugsan

Torbjørn Jacobsen er samdur í tí, sum formaðurin í flokkinum førir fram um, at veljarin gav greitt til kennar, at báðir politikararnir eiga at halda fram í flokkinum.

– Vit høvdu baðir framgongd á valinum. Tjóðveldisflokkurin stóð seg lutvíst best í Eysturoynni, og eg havi ongantíð áður fingið so nógvar persónligar atkvøður har, sigur Torbjørn Jacobsen.

– Tað var áðrenn valið lagt upp til, at nú skuldi veljarin døma í málinum, og eg haldi, at hevur veljarin sagt sína hugsan um stríðið. Um tað verður rætt telvað nú, so er málið úti av verðini.

### Ein kúla byrjaði kríggj

Torbjørn Jacobsen heldur, at stríðið millum hann og formannin fór fullkomiliga á glið, eftir at hann hevði havt sínar viðmerkingar.

– Tað verður sagt, at fyrsti veraldarbardagi byrjaði, tá ið prinsurin varð skotin í Sarajevo. Tað var ein kúla, sum byrjaði kríggið, men síðani vóru nógvar kúlur skotnar. Tað hevur verið nakað tað sama í hesum stríðnum, tí viðmerkingarnar hjá mær vóru bara byrjanin, og tað hava verið nógvar kúlur skotar síðani.

– Stríðið fór fullkomiliga á glið, og tað varð lagt nógv meira í mínar viðmerkingar, enn eg sjálvur legði í tær, serliga av fólki, sum als ikki høvdu lisið viðmerkingarnar. Eingin fekk steðgað málinum aftur, sigur Torbjørn Jacobsen.

### Valið skapti tveir vinnarar

Tingmaðurin úr Eysturoynni heldur, at fólkatingsvalið kom væl við hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Stríðið var komið hartil, at tveir persónar vóru settir upp ímóti hvørjum øðrum, og annar skuldi vinna og hin tapa. Tað merkisverda er tó, at valið gjørdi báðar til vinnarar. Eg eri sera fegin um hetta, tí mín politiska hugsjón passar bara inn í Tjóðveldisflokkinum, sigur Torbjørn Jacobsen.

*Fekst tú nakað burtur úr tí, sum tú skrivaði?*

– Eg haldi ikki, at nakar hevur fingið nakað burtur úr hesum stríðnum. Men vit hava so avprøva nøkur mørk í flokkinum, og hetta vísir seg, at flokkurin er sera sterkur. At ein flokkur klárar eitt slíkt stríð vísir, at tað er øgiligt seiggj í honum, heldur Torbjørn Jacobsen.

– Nú fáa vit so at síggja, hvat hendir á fundinum týsdagin, og hvussu tað verður við mínum leiklut í tingbólkinum, og hvussu annars flokkurin skal endaliga avgreiða hetta málið, sigur hann.

### Formaðurin fáorðaður

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, er fáorðaður, tá ið hann verður spurdur um, hví Torbjørn Jacobsen hevur fingið fundarboð til fund í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum, har hann sambært eini samtykt í flokkinum skuldi útihýsast.

– Nú er valið av, og vit fara av viðgera, hvat skal henda víðari, sigur Høgni Hoydal, og hann vil ikki siga meira um, hví Torbjørn Jacobsen hevur fingið fundarboð til fundin í tingbólkinum týsdagin.

Høgni Hoydal segði tó eftir valið, at nú skuldi ein loysn finnast á stríðnum, og hann vildi arbeiða fyri tí.

# 350 til fund um tilbúgving

**Fyrireikararnir av tiltakinum um tilbúgving í Norðoyggjum eru væl nøgdir við undirtøkuna, og teir halda, at fundurin tænti sínum endamáli**

TILBÚGVING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið skipaði Norðoya Bjargingarfelag fyri einum tiltaki í og kring KÍ-høllina, har tilbúgving í Norðoyggjum stóð ovast á breddanum.

Eini 350 fólk vóru til tiltakið, og tað eru fyrireikararnir væl nøgdir við.

– Tað var eitt sera gott kunnandi tiltak, sum náddi sínum endamáli. Vit vildu seta fokus á tilbúgving uttan at ræða fólk, og eg haldi, at tiltakið gav eina breiða kunning um tilbúgvingina, sigur Marius Magnusson, formaður í Norðoya Bjargingarfelag.

### Tyrla í túninum

Fleiri upplegg vóru frá fólki, sum starvast innan okkurt økið í tilbúgvingini, og fundarfólkið hevði eisini møguleikan at seta einum paneli spurningar. Millum annað var onkur spurningur um tilbúgvingina í sambandi við nýggja Norðoyatunnilin.

Uttan fyri KÍ-høllina var eisini okkurt at fáa við. Ein stórur bjargingarbátur varð blástur upp, og tyrlan setti seg á parkeringsplássinum. Eisini vóru neyðsendarakfør at síggja.

– Tað vóru munandi fleiri fólk til hetta tiltak, enn eitt líknandi tiltak, sum vit høvdu í fjør. Tað vóru ikki bara fakfólk ella fólk innan tilbúgving til tiltakið, men ein breið umboðan av fólki úr Norðoyggjum, hóast tað vísti seg, at tað mesta var mannfólk, sigur Marius Magnusson.